## Fyrsti stóri kaðal-kundi



British Telecom, BT, er fyrsta stóra kundan hjá Føroya Tele á SHEFA2-kaðlinum. Feløgini hava avtalað, at BT keypir kapasitet á kaðlinum á strekkinum millum Norðurskotland, Orknoyggjarnar og Hetland. Talan eru um ein lagtíðarsáttmála. - Tað hevur stóran týdning fyri okkum at hava fingið ein so stóran kunda á SHEFA 2. Skjøtul er nú settur í virksemið á kaðlinum, og vit royna alsamt at fáa fleiri stórar kundar, sigur Kristian R. Davidsen, samtaksstjóri í Føroya Tele. Eisini BT fegnast um samstarvið við Føroya Tele. - Tað er frálíkt at hava fingið eina avtalu við Føroya Tele um at gagngnýta kapasitet á teirra kaðli. Hetta eru veruliga góð tíðindi í Orknoyggjum og Hetlandi, tí kaðalin verður ein týðandi partur av ætlanunum at veita oyggjunum fyrimunirnar av okkara nýggja 21. øld netverk, sigur Brian Fitzpatrick stjóri í BT Wholesale Markets. SHEFA-kaðalin fer saman við FARICE at geva Føroyum trygt fjarskifti úteftir og at kalla óavmarkaða fjarskiftisorku mótvegis umheiminum. Nýggja sambandið nøktar fjarskiftistørvin hjá føroyingum mótvegis umheiminum í nógv ár frameftir, og tað lyftir eisini fjarskiftissambandið hjá Hetlandi og Orknoyggjum við umheimin upp á eitt nógv hægri støði. SHEFA 2 kostar 120 milliónir krónur, og hann verður væntandi tikin í nýtslu fyrsta ársfjórðing 2008.

# Brúka 140 milliónir afturat í Havnini

**Hetta er tað einasta rætta, heldur meirilutin í Tórshavnar Kommunu, men minnilutin heldur, at hetta er púra ørt**

BÝRÁÐIÐ

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Næsta ár verður rættiliga nógv virksemi í Tórshavnar Kommunu.

Tað er greitt eftir at Tórshavnar Kommuna í gjárkvøldið samtykti fíggjarætlanina fyri næsta ár.

Í hesum sambandi hevur býráðið samtykt, at næsta ár fer tað at kosta ikki minni enn 742,4 milliónir at reka Tórshavnar Kommunu. Hetta eru heilar 142,2 milliónir meiri enn tað kostar at reka kommununa í ár, tí fíggjarætlanin í ár er upp á 590,2 milliónir.

**Fíggjarætlanin hjá Tórshavnar Kommunu**

| | 2008 | 2007 |
|---|---|---|
| Fyrisitingin | 57,0 | 48,3 |
| Vegir, vatn, kloakk o.a. | 113,9 | 96,9 |
| Skúlar | 45,0 | 39,1 |
| Mentan og frítíð | 29,6 | 27,4 |
| Almanna, heilsumál | 35,0 | 33,0 |
| Barnansing | 135,0 | 122,3 |
| Ymiskt | 66,1 | 61,5 |
| Regulering | 3,0 | 3,0 |
| **Rakstur tils.** | **484,6** | **431,5** |
| Íløgur | 256,8 | 155,0 |
| Rentur | 1,0 | 1,4 |
| Avdráttir | 0,0 | 2,3 |
| **Útreiðslur Tilsamans** | **742,4** | **590,2** |

*Næsta ár verður skattaprosentið í havn óbroytt, 19,75% og barnafrádrátturin verður 5.500 fyri hvørt barn undir 18 ár og tað er 500 krónur meiri enn í ár.*

*Hendan talvan vísir í høvuðsheitum, hvussu nógv tað fer at kosta at reka Tórshavnar Kommunu næsta ár, samanborið við kostnaðin í fjør*

### Einasta rætta

- Fíggjarætlanin fyri næsta ár er eitt talandi dømi um, at tað hendir nakað í Tórshavnar Býráð, segði Jógvan Arge, sum var tann býráðslimurin, sum mest førdi orðið fyri samgonguna.

Hann vísti á, at eftir kreppuna fyri 10-15 árum síðani, eru nógv viðurskifti í kommununi afturúrsiglt og hvørki ment ella røkt, sum ynskiligt og rætt hevði verið.

Tí er neyðugt at taka eitt ódnartak nú fyri at dagføra kommuna og byggja neyðugar tænastur til borgaran.

- Tí er tað ikki so undarligt, at íløgurnar eru størri enn vanligt

Hann helt eisini, at tað er ein andsøgn í, at kommunan skal onki gera í vánaligum tíðum, men at hon heldur onki skal gera í góðum tíðum.

Tað er eisini freistandi at halda, at kommunan sak bíða við at gera íløgur, tí nú er alt blivið so nógv dýrari, men so fáa borgararnir heldur ikki teir neyðugu batarnar.

### Púra ørt

Andstøðan helt, at fíggjarætlanin hjá samgonguni í býráðnum er púra ørt í høvdinum. Serliga átalaði andstøðan, at umsitingin hjá býráðnum er vorðin so nógv dýrari.

Men serliga helt andstøðan tað vera heilt burturvið at seta so nógva pening av til íløgur, serliga tá ið hetta merkir, at tað verður neyðugt at hjá kommununi at seta seg í skuld fyri at seta ætlanirnar í verk, enntá í góðum tíðum.

Andstøðan mælti tískil til at lække raksturin og íløgurnar 100 milliónir. Hinvegin mælti minnilutin eisini til at hækka barnafrádráttin 500 krónur, úr 5500 krónur fyri hvørt barnið, upp í 6000 krónur.

Andstøðan legði dent á, at andstøðan ætlaði ikki at skerja nakrar íløgur, ella nakrar rakstrarútreiðslur, men hon helt, at tað var neyðugt at tálma vøkstrinum.

Jan Christiansen í andstøðuni var púra vísur í, at tað var ongin skaði í at skerja íløgurnar munandi, tí hann var vísur í, at býráðið fór aldrin at klára at gera íløgur fyri 150 milliónir.

Í ár klárar kommunan ikki at byggja fyri meiri enn 100 milliónir, tí arbeiðsorka og maskinorka er ikki til meiri enn tað.

Bæði Leivur Hansen, Heðin Mortensen og Elin Lindenskov úr samgonguni fýltust á, at andstøðan ikki at var komin við sínum broytingum fyrr, so at býráðið fekk stundir at viðgera tær, tí tað var ikki óhugsandi, at undirtøka hevði verið fyri onkrum av uppskotunum. Men nú var ov seint.

Elin Lindenskov meinti eisini, at tekur býráðið ikki eitt ódnartak nú, verður tað bara at skumpa trupulleikan frammanfyri sær til tey næstu árini.

Tað endaði alt samalt við, at meirilutin í býráðnum samtykti fíggjarætlanina og minnilutin atkvøddi ikki fyri.

# Havnarfólk koyra í bussi sum aldrin fyrr

**Næsta ár skulu býbussarnir í Havn koyra tríggjar ferðir um tíman ístaðin fyri tvær ferðir sum nú**

BUSSLEIÐIN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað er ongantíð so neyðugt sum nú at hava nógvar býbussar í Havnini.

Tað staðfesti Leivur Hansen, býráðslimur í Havn á býráðsfundi í Havn í gjárkvøldið.

Tórshavnar Býráð hevur samtykt at næsta ár skulu býbussarnir í Havn koyra nógv meiri enn teir koyra nú.

Í eini roynd at tálma støðugt vaksandi ferðslutrýstinum í kommununi og at fáa fólk at brúka býbussarnar ístaðin, gjørdi býráðið gjørdi býráðið tað ókeypis at koyra í býbussunum.

Hetta er so væl umtókt, at bussarnir ofta koyra fullsettir.

Tí er ætlanin at halda fram við ókeypis koyringini næsta ár. Men harumframt er eisini ætlanin at økja munandi um koyringina. Í hesum sambandi er ætlanin at keypa fýra nýggir býbussar og sostatt fara bussarnir næsta ár at koyra ein túr afturat um tíman, so at tað frá á nýggjárinum verða koyrdir tríggir túrar um tíman á øllum rutum.

Sostatt mælti meirilutin í býráðnum til at hækka játtanina til Bussleiðina upp í 16,5 milliónir næsta ár, í ár kostar Bussleiðin 11,6 milliónir.

Minnilutin í Býráðnum heldur, at hetta er nakað nógv avgjørt og mælir til at hækka játtanina til Bussleiðina eina millión næsta ár ístaðin.

Leivur Hansen ivaðist ikki í, at Bussleiðin fer at vera eitt heilt stórt fyribrigdi í Havnini í komandi tíðum, tí allar metingar vísa, at prísurin á bensini fer munandi upp í næstu framtíð. Tí helt hann, at tað var heilt burturvið ikki at raðfesta Bussleiðina heilt høgt.

Høgni Mikkelsen í minnilutanum helt lítið um, at brúka bensinprísin sum grundgeving fyri at økja um Bussleiðina. Hann staðfesti, at ferðslan í Havnini var heilt avgjørt ikki minni nú, enn hon var, tá ið bensini kostaði ein triðing minni.




*Næsta ár fara býbussarnir í Havn at koyra sum ongantíð fyrr*